## Sunda-skúlar felags nevnd

Á seinasta bygdaráðsfundi fyri jól samtykti Sunda Kommuna at seta eina felags nevnd fyri skúlarnar í kommununi. Tað boð kommunan frá á heimasíðu sínari. Talan er um eina nevnd, sum skal síggja til, at hvør einstakur skúli í kommununi tekur fyrilit fyri kommunalu eindini, og har lagt verður upp til samstarv millum skúlarnar í mest møguligan mun. Nevndin verður sett saman av formonnunum í verandi skúlastýrum og umsitingin í kommununi fer at hava skrivarauppgávuna um hendi. Sunda Kommuna fer í næstum at venda sær til Eiðis kommunu viðvíkjandi Felagsskúlanum, so hann eisini kann gerast partur av ætlanini.



## Tyngjandi upptøkur fella politikara

Chua Soi Lek, heilsumálaráðharri í Malaysia, fór í dag frá, at tyngjandi sjónbandaupptøkur við honum og eini kvinnu sóu dagsins ljós í farnu viku. Upptøkurnar vísa hann og kvinnuna í kynsligari samlegu, og í gjár viðgekk Chua, at tað var hann, sum var á sjónbandaupptøkunum. 60 ára gamli Chua Soi Lek er giftur maður og pápi at trimum børnum. Tískil hava upptøkurnar av honum í song við fremmandu kvinnuni skakað Malaysia, sum í stóran mun er muslimskt.

# Føroysk partabrøv hækkaðu mest og minkaðu minst í virði



*Virðisbrævamarknaðurin í Reykjavík*

*(Mynd: Vísir)*

**Atlantic Petroleum átti ta størstu virðishækkingina á partabrævamarknaðinum í Reykjavík í fjør, og Føroya Banki átti tað minsta fallið**

???

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Atlantic Petroleum var tað felagið, sum stóð seg nógv best á tí íslendska virðisbrævamarknaðinum í 2007. Virðið á partabrøvunum í felagnum vaks heili 258 prosent, og tað var nógv meiri enn nakað annað felag. Á næsta plássi kom íslendska felagið Vinnslustöðin hf, hvørs partabrøv hækkaðu 89 prosent í virði, og nummar trý var felagið Nýherji, sum hækkaði 52,63 prosent.

Hini trý føroysku feløgini, sum eru skrásett í Kauphöll Íslands, fullu øll í virði í fjør. Størsta fallið høvdu partabrøvini í Eik Banka, sum fullu 26,24 prosent, síðani kom Atlantic Airways við 8,49 prosentum, og minsta fallið átti Føroya Banki, hvørs partabrøv minkaðu 3,17 prosent í virði í fjør. Av teimum feløgunum, sum eru skrásett á marknaðinum í Reykjavík, og sum minkaðu í virði í fjør, átti Føroya Banki tað minsta fallið.

Størsta fallið á marknaðinum hevði Flaga Group við 67,56 prosentum, 365 hf minkaði 55,74 prosent, og SPRON, sum bleiv skrásett seint á árinum, fall 51,69 prosent í virði.

Tað kenda felagið FL-Group lækkaði 42,82 prosent.

**Hækkingar í 2007**

| | |
|---|---|
| P/F Atlantic Petroleum | 257,89% |
| Vinnslustöðin hf | 88,89% |
| Nýherji hf | 52,63% |
| Atorka Group hf | 46,45% |
| Alfesca hf | 36,71% |
| Landsbanki Íslands | 33,96% |
| Marel Food Systems hf | 32,47% |
| Tryggingarmiðstöðin hf | 24,67% |
| Teymi hf | 9,80% |
| Hf. Eimskipafélag Íslands | 6,77% |
| Kaupthing Bank | 4,64% |
| Icelandair Group hf | 0,54% |
| Century Aluminum Company | 0,18% |

**Fall í 2007**

| | |
|---|---|
| Flaga Group hf. | 67,56% |
| 365 hf. | 55,74% |
| SPRON hf. | 51,89% |
| FL Group hf. | 42,82% |
| Icelandic Group hf. | 31,32% |
| Eik Banki P/F | 26,24% |
| Straumur-Burðarás | 13,22% |
| Össur hf. | 12,83% |
| Exista hf. | 12,22% |
| Atlantic Airways P/F | 8,49% |
| Bakkavör Group hf. | 6,40% |
| Glintir banki hf. | 5,79% |
| Föroya Banki P/F | 3,17% |

(Kelda: Vísir)